# Henrik Gerster er nýggjur Stjørnu venjari

**Setningurin er at hondbóltskvinnurnar í Klaksvík skulu vera best í landskappingini og steypakappingini**

HONDBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Fríggjadagin varð sáttmáli undirskrivaður í Klaksvík, sum staðfestir, at Henrik Gerster næsta kappingarár verður venjari hjá hondbóltskvinnunum í Stjørnuni. Henrik er kendur sum bæði hondbóltsspælari og venjari. Hann hevur eitt nú vant bæði H71 og mans hondbóltslandsliðið.

Við heimasíðuna hjá Norðlýsinum sigur nýggi Stjørnuvenjarin, at tað verður farið undir venjingina síðst í juli, og at hann og nevndin í felagnum inntil tá fara at arbeiða við at styrkja um spælarahópin.

Formaðurin í Stjørnuni, Kristoffur Ragnarson, sigur við Norðlýsið, at tey í felagnum eru fegin um at hava knýtt besta venjaran í landinum at kvinnuliðnum, og at málið er at vinna bæði FM heitið og steypakappingina.

Í fjør vann Stjørnan FM, meðan tær taptu finaluna í steypakappingini móti Neistanum.

Skála-EB/Streymur 1-1 (1-0):

# Skála gav toppinum skarpan gang

**Leingi bendi einki á, at tað var heimaliðið á Skála, sum stríddist fyri at sleppa leyst úr botninum, og at tað vóru gestirnir av Mølini, sum royndu at verja oddasessin**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Samansetta liðið úr Sundalagnum og Eiði fekk veruliga at kenna, at Skála nú er um at finna stevið, sum tey bæði seinastu kappingarárini hevurført liðið heilt nær føroysku fótbóltstindunum*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Skála hevur higartil í ár ikki verið tað, sum Skála var í fjør. Sunnudagin vístu teir á heimavølli, at teir eru um at finna stevið. Toppliðið úr Sundalagnum, og Skála var leingi leikliga omaná.

Serliga undan steðginum vóru skálamenn væl upplagdir. Pauli G. Hansen var í vanliga leiklutinum á sentrala miðvøllinum, og sentrala Skála styrkin gjørdist uppaftur størri, nú Alexandur Johansen fyri fyrstu ferð í ár var millum teir fyrstu ellivu. Hann var sentralur í trímanna álopinum. Leikluturin hjá honum var ofta at detta eitt sindur aftur um hinar báðu í fremstu røð. Jónhard Frederiksberg og Debus Danielsen høvdu hug at flyta seg inn úr borðunum, og hetta riggaði væl, tí Alexandur vísti seg at vera meistari í at taka ímóti bóltinum, at verja hann, og væl at síggja, nær hann skuldi sleppa honum.

Oddaliðið var ikki í tí lagnum, sum hevur borið teir upp á fremsta plássið. Teir løgdu merkiliga trilvandi fyri. Tað kendist sum um, at tað meiri ráddi um hjá teimum at binda fyri í verjupartinum, enn tað ráddi um at leypa á, og spælararnir vóru týðuliga ikki álvuligir við hesa støðuna.

Bólturin var væl meiri á EB/Streyma hálvuni í 1. hálvleiki. Skála leyp á við nógvum fólki, teir nýttu breidd og dýpd, og teir spældu seg til fleiri góðar málmøguleikar.

Trupulleikin hjá teimum var tann, sum ofta vísir seg hjá teimum, ið ikki hava undanvind. Tað gekk illa at umseta møguleikarnar til mál.

Eitt mál fingu teir, tá ið sjey minuttir vóru farnir. Arnhold Berg, sum er komin fyri seg eftir leingi at hava verið skaddur, legði fram til Jónhard Frederiksberg, sum legði út frá baklinjuni til Alexandur Johansen, sum skoraði.

Í øðrum førum var talan um hálvar møguleikar eftir innlegg, og í tí eina førinum bjargaði René Tórgarð meistarliga, eftir at Debus Danielsen við høvdinum hevði sent bóltin niður í vøllin, og tey flestu mundu síggja bóltin í málinum, tá ið málverjin vísti framúr hegni.

### Moralur og treiskni

Skála fekk ikki málið, sum ivaleyst hevði havt givið teimum meiri frið, og sum 1. hálvleikur leið og serliga í 2. hálvleiki fóru teir í EB/Streymi at vísa tenn. Tøvandi og trilvandi útgangsstøðan var slept. Eftir steðgin varð Marni Djurhuus fluttur fram á sentrala miðvøllin, og tað kom meiri ferð og størri tyngd í álopspartin.

Hans Pauli Samuelsen var í útgangsstøðuni í høgra borði. Saman við hinum framrættaðu monnunum reikaði hann nógv. Eftir steðgin var hann fyri tað mesta í vinstra borði, og har var tað, at hann ellivu minuttir fyri leiklok vann fríspark, sum bara 1-1 málið við sær.

Avbrotsteigarsamankomingini í vinstru royndi Hans Pauli seg sjálvur við frísparkinum. Sum Beckham so vísti Hans Pauli, at manngarðarnir hava lítið upp á seg, tá ið spælarin hevur hegni at skjóta upp um verjugarðin og í ta síðuna av málinum, sum málverjin roknar við, at liðfelagarnir verja fyri. Skotið hjá Hans Paula brast í nærra stólpan, bólturin stakk í meskarnar, og harvið hevði oddaliðið vunnið eitt – kanska eitt sindur heppið – stig.

Men tað er avgjørd dygd at megna at koma afturíaftur, tá ið mótstøðuliðið leingi hevur verið omaná. Hesa dygdina vísti EB/Streymur, og tað er ikki minst henda dygdin, sum fer at hava alstóran týdning, nú teir í Sundalagnum skulu verja oddasessin og harvið stýra fram ímóti fyrsta FM heitinum nakrantíð.

## Gamla lagið á Skála

Jónhard Frederiksberg fegnaðist um, at tað nú av álvara tykist ganga rætta vegin hjá Skála.

– Serliga í 1. hálvleiki hekk tað væl saman hjá okkum. Tað hevur alstóran týdning, at Alexandur Johansen. Hann megnar væl at halda upp á bóltin frammarlaga á vøllinum. Harvið verður alt liðið flutt longri fram á vøllin. Eftir steðgin duttu vit longri aftur á vøllin. Vit høvdu ætlað at hildið fram á sama hátt, sum vit høvdu gjørt í 1. hálvleiki, men teir vóru nógv meiri álopshugaðir í 2. hálvleiki, enn teir høvdu verið undan steðginum.

Jónhard Frederiksberg heldur, at teir kundu havt vunnið, um teir vóru eitt sindur hepnari:

– Í mun til spælbýti og møguleikar kundu vit havt vunnið. Vit eru tó fegnir um eitt stig ímóti oddaliðnum. Áskoðararnir vóru vitni til gott undirhald, og avrikið gevur okkum mót um, at úrtøkan fer at økjast.

## Oddaliðið var heppið

Málskjúttin hjá EB/Streymi, Hans Pauli Samuelsen, heldur, at hann og liðfelagarnir avgjørt skulu vera nøgdir við eina stigið, sum teir fingu við av Skála.

– Vit vóru verjukendir fyrstu løtuna. Tað var skjótt, at vit sóu, at hetta var ikki tað, sum vit eru bestir til. Besta verjan hjá okkum er at leypa á. Tað varð eisini staðfest í 2. hálvleiki, tá ið vit eirindarleyst fóru fram á vøllin fyri at fáa mál. Tíbetur eydnaðist tað.

Tit mistu í toppstríðnum?

– Vit mistu tvey stig ímóti liði, sum sunnudagin var væl betri, enn støðutalvan boðar frá. Samstundis vóru vit hepnir, tí øll hini, sum vit kappast við – við undantaki av B36 – fingu eisini eitt stig í part, staðfestir Hans Pauli Samuelsen.

-jh